Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 3. august 2020
Mál nr.: 20/00301-7
Málsviðgjørt: JTN

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í kommunuvallógini og løgtingsvallógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 26. apríl 1974, løgtingslóg nr. 98 frá 18. oktober 1984, løgtingslóg nr.105 frá 9. november 1984, løgtingslóg nr. 110 frá 6. oktober 2000, løgtingslóg nr. 66 frá 11. oktober 2004, løgtingslóg nr. 67 frá 11. oktober 2004 og løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 1. Valrætt og valbæri til bygda(r)ráðsval/býráðsval hevur hvør tann, sum a) Hevur fylt 18 ár og annars lýkur hinar treytirnar fyri valrætti og valbæri til løgtingið. b) er tilmeldaður fólkayvirlitið í avvarðandi kommunu í seinasta lagi 2 vikur áðrenn tann dagin, valið fer fram.	**1.** Í § 1 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett: "*Stk. 3.* Hóast stk. 1, litra a, hevur persónur, sum er undir verjumáli og hevur fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir Værgemálsloven § 6, sum sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan, valrætt og valbæri til kommunuval."

c) og sum valdagin framvegis er búsitandi í kommununi. *Stk. 2.* Hóast stk. 1, litra a, hava ríkisborgarar úr øðrum londum valrætt og valbæri til kommunuval, um so er, at teir hava havt fastan bústað í Føroyum seinastu 3 árini undan valinum. *Stk. 3.* Eingin, sum stendur ikki á vallistanum, kann útinna valrætt. *Stk. 4.* Um onkur er komin á vallistan, men sum ikki longur er fastbúgvandi í kommununi, hevur hann ikki rætt til at velja.	Stk. 3-4 verða eftir hetta stk. 4-5.
§ 4. ... *Stk. 2-4 ...* *Stk. 5.* Vísir tað seg, eftir at freistin í stk. 4 er farin, at onkur rættkomin ikki er tikin við á listan, ella at onkur av órøttum er komin á listan, kann bygdarráðið/býráðið á fundi í seinasta lagi dagin fyri valið rætta hetta.	**2.** Í § 4, stk. 5 verður "bygdarráðið/býráðið á fundi í seinasta lagi dagin fyri valið rætta hetta" broytt til: "hetta rættast til og við valdagin".
§ 15. Í niðanfyri nevndu førum kann valnevndin slaka í teim fyrisettu reglunum fyri atkvøðugreiðsluni: a) Um persónur møtir til val og sigur frá, at hann er ikki førur fyri einsamallur at greiða atkvøðu á fyriskrivaðan hátt, kann hann fáa hjálp til hetta frá einum av valnevndini til hetta endamál tilnevndum persóni, sum er undir tøgnskyldu. b) [3] Um persónur er so mikið lamin ella á annan hátt so mikið brekaður, at hann er ikki førur fyri at koma sær inn í valhølið, kann hann krevja, at atkvøðugreiðslan fer fram beint uttan fyri valhølið, og skulu í hesum føri 2 av nevndarlimunum ella hjálparfólkunum vera hjástaddir, og um neyðugt veita honum hjálp við atkvøðugreiðsluni. Blindur ella sjónveikur persónur kann tó krevja hjálp frá persóni, ið veljarin sjálvur vísir á.	**3.** § 15 verður orðað soleiðis: "**§ 15.** Um veljari møtir til val og sigur seg ikki føran fyri einsamallan at greiða atkvøðu á ásettan hátt, kann hann fáa hjálp til hetta frá tveimum limum í valnevndini, valstýrinum ella hjálparfólkum. *Stk. 2.* Um veljari ikki er førur fyri at koma sær inn í valhølið, kann hann krevja, at atkvøðugreiðslan fer fram beint uttan fyri valhølið, og skulu í hesum føri tveir persónar, sum eru limir í valnevndini, valstýrinum ella hjálparfólk vera hjástaddir, og um neyðugt veita honum hjálp við atkvøðugreiðsluni. *Stk. 3.* Veljarin kann krevja at annar av persónunum, sum veitir hjálp við atkvøðugreiðsluni, sbrt. stk. 1 ella 2, verður skiftur út við ein persón, sum veljarin sjálvur vísir á. *Stk. 4.* Limir í valnevndini, valstýrinum, hjálparfólk og persónar, sum veljarin

	sjálvur vísir á, hava tagnarskyldu, tá ið teir veita hjálp sbrt. stk. 1-3.”
§ 16. ... *Stk. 2-5* ... *Stk. 6.* Brot upp á tær í stk. 4 og 5 nevndu fyriskipanir verða revsað við sekt, hefti ella fongsli.	**4.** Í § 16, stk. 6 verður “, hefti” strikað.
	§ 2 Í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Løgtingið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 61 frá 26. mai 2010, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 26. Í niðanfyri nevndu førum kann valstýrið slaka í teimum fyrisettu reglunum fyri atkvøðugreiðslu: a) Um persónur møtir til val og sigur frá, at hann er ikki førur fyri einsamallur at greiða atkvøðu á fyriskrivaðan hátt, kann hann fáa hjálp til hetta frá tveimum av valstýrinum til hetta endamál tilnevndum persónum, sum eru undir tagnarskyldu. Blindur ella sjónveikur persónur kann tó krevja hjálp frá persóni, ið veljarin sjálvur vísir á. b) Um persónur er so mikið lamin ella á annan hátt so mikið brekaður, at hann er ikki førur fyri at koma sær inn í valhølið, kann hann krevja, at atkvøðugreiðsla fer fram beint uttan fyri valhølið, og skulu í hesum føri 2 av valstýrislimunum ella hjálparfólkunum vera hjá staddir, og um neyðugt veita honum hjálp við atkvøðugreiðsluni.	**1.** § 26 verður orðað soleiðis: “**§ 26.** Um veljari møtir til val og sigur seg ikki føran fyri einsamallan at greiða atkvøðu sum ásett, kann hann fáa hjálp til hetta frá tveimum limum í valnevndini, valstýrinum ella hjálparfólkum. *Stk. 2.* Um veljari ikki er førur fyri at koma sær inn í valhølið, kann hann krevja, at atkvøðugreiðslan fer fram beint uttan fyri valhølið, og skulu í hesum føri tveir persónar, sum eru limir í valnevndini, valstýrinum ella hjálparfólk vera hjástaddir, og um neyðugt veita honum hjálp við atkvøðugreiðsluni. *Stk. 3.* Veljarin kann krevja at annar av persónunum, sum veitir hjálp við atkvøðugreiðsluni, sbrt. stk. 1 ella 2, verður skiftur út við ein persón, sum veljarin sjálvur vísir á. *Stk. 4.* Limir í valnevndini, valstýrinum, hjálparfólk og persónar, sum veljarin sjálvur vísir á, hava tagnarskyldu, tá ið teir veita hjálp sbrt. stk. 1-3.”
	2. Í § 39 verður sum stk. 4 sett: “*Stk. 4.* Um veljarin sigur seg ikki føran fyri at fylla út atkvøðuseðilin ella fylla

	út og undirskriva fylgibrævið sum ásett, kann hann fáa hjálp til hetta frá persóni, sum skal taka ímóti tilfarinum. Veljarin kann krevja, at ein persónur, sum veljarin sjálvur vísir á, eisini er til staðar í teimum førum, veljarin hevur tørv á hjálp.”
§ 45. Røkir nakar ikki tær skyldur, sum henda lóg fyriskrivar, verður hann revsaður við bót, um so er at strangari revsing ikki er uppiborin eftir lóggávuni annars. **§§ 46-47.** ... **§ 48.** Tað er forboðið floksskrivstovum ella øðrum miðvíst at kanna eftir, um veljarar møta fram til atkvøðugreiðslu. Brot á hesa reglu verður revsað við bót.	**3.** Í § 45 og § 48 verður “bót” broytt til “sekt”.
§ 47. ... *Stk. 2.* Brot uppá tær í stk. 1. nevndu fyriskipanir verða revsaðar við bót ella hefti.	**4.** Í § 47, stk. 2 verður “bót ella hefti” broytt til “sekt”.
	§ 3 Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.